## Avsannar tíðindi um hungursneyð

Í Zimbabwe hevur Robert Mugabe, forseti avsannað tíðindini um, at fólk í landi hansara líða hungur, og hann hevur givið løgregluni boð um at taka tey, sum bera tíðindini um hungursneyð.

Samstundis hevur ein nevnd hjá stjórnini váttað, at álvarssamar sjúkur eru farnar at gera um seg har suðuri í landinum, og tingmenn í landspørtunum siga, at nógv eru deyð í hungri har. Men tað vil Mugabe ikki viðurkenna. Hann sigur tvørturímóti, at tíðindini um hungursneyð hava bert til endamáls at koma honum og stjórnini í ringt orð. Tí hevur hann nú givið løgregluni boð um at taka tey, sum bera tíðindini.

Frakland játtaði í gjár góðar sjey milliónir krónur í matvøruhjálp til Zimbabwe, Zambia og Lesotho.

## Kanna lægd í Sibir

Russiskir vísindamenn hava biðið myndugleikarnar í Moskva um pening, so teir kunnu fara til Irkutsk-landspartin har eysturi í Sibir at kanna eina lægd, tí ymiskt bendir á, at lægdin stavar frá einum steini uttan úr rúmdini, sum datt niður har seinasta hósdag.

Russisku myndugleikarnir siga, at nógv fólk hava boðað frá, at tey sóu okkurt koma niður úr luftini tann dagin, og seinni hava menn funnið eina lægd. Sagt verður, at summi trø við lægdina eru brend, og at onnur eru kvett tvørturav.

Enn hevur stjórnin í Moskva ikki svarað umsóknini frá russisku vísindamonnunum, men nú hava bretskir vísindamenn mælt til, at onnur lond eiga at játta tann neyðuga peningin til kanningina. Bretski vísindamaðurin Benny Peiser sigur, at talan er um smápengar, tá hugsað verður um, hvussu týðandi upplýsingar møguliga kunnu fáast burtur úr kanningini.

## Heimsmet í at royta seyð

Avstraliumaðurin Trevor Bacon setti fyrradagin nýtt heimsmet í seyðaroyting. Metið varð sett í einari kapping í Frances har suðuri í Avstralia.

Trevor Bacon roytti ella rættari sagt klipti ullina av 471 lombum eftir átta tímum, og tað er nýtt heimsmet. Gamla metið átti ein nýsælendingur, sum fekk ullina av 427 lombum eftir átta tímum.

Trevor Bacon var sum vera man fegin um metið og um at fáa navnið í heimsmetabókina hjá Guinness, men aftan á kappingina gjørdi hann øllum greitt, at hann vildi ikki síggja ein ullasaks aftur. Og tað er kanska ikki so løgið.

## Vinningurin er ein ferð til himmals

Tað er næstan einki mark fyri, hvat fólk, sum skipa fyri kappingum, kunnu finna upp á, tá tað ræður um at finna vinningar.

Nú hevur russiska sjónvarpsstøðin ORT boðað frá, at hon fer at skipa fyri einari kapping, har hyggjararnir skulu kappast um at vinna eina ferð til himmals, sum sagt verður. Tann, sum vinnur, sleppur eina ferð upp til rúmdarstøðina ISS, sum er í ringrás um Jørðina.

Russisku rúmdarmyndugleikarnir hava góðkent kappingina og hava skrivað undir sáttmála við ORT. Í síðsta mánað strikaðu russar ein sáttmála við popptónleikaran Lance Bass úr bólkinum N'Sync, tí hann hevði ikki rindað ta kravdu upphæddina. Fyrr hava russar sent tvey ferðafólk upp til ISS.

UTTAN ÚR HEIMI

# Bretar fyrireika koppseting ímóti biologiskum álopi

**Bretsku myndugleikarnir fyrireika seg til at koppseta fólk ímóti koppum. Endamálið er at verja fólkið ímóti einum møguligum biologiskum yvirgangsálopi**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Myndugleikarnir í London royndu í gjár at sissa fólk við at siga, at fyrireikingarnar eru ikki settar í verk, tí vandin fyri einum biologiskum álopi er størri nú, enn hann hevur verið í seinastuni.

- Vit noyðast at fyrireika okkum til øll hugsandi álop, segði ein talskvinna hjá heilsumálaráðnum og legði afturat, at í fyrsta umfari er ætlanin at koppseta starvsfólk í heilsuverkinum, so tey kunnu viðgera onnur, skuldi eitt tílíkt álop komið.

Sir Liam Donaldson, sum er stjóri í bretska heilsuverkinum, segði við BBC í gjár, at myndugleikarnir hava lagt umfatandi ætlanir fyri at verja fólkið ímóti einum møguligum biologiskum álopi. Hann váttaði, at myndugleikarnir eisini hava umhugsað at koppseta allar bretar.

Alment vórðu kopparnir útruddaðir í 1980, men nakað av koppavirus, sum er lívshættisligt og smittar sera illa, varð goymt á amerikanskum og russiskum rannsóknarstovum. Serfrøðingar bera ótta fyri, at onnur lond kunnu hava fingið fatur á hesum virusi og hava gjørt biologisk vápn burtur úr tí.

# Blair fingið kravboð úr Norðurírlandi

**Norðurírski fyrstiráðharrin, David Trimble, hevur givið Tony Blair greið kravboð: Hann skal tveita Sinn Finn út úr norðurírsku stjórnini innan eina viku**

NORÐURÍRLAND
*Árni Joensen*

- Tveit Sinn Fein úr stjórnini í Belfast, ella fari eg.

Tað vóru tey greiðu kravboðini, sum bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, fekk frá norðurírska fyrstaráðharranum, David Trimble, tá teir báðir hittust til kreppufundar í Downing Street seinnapartin týsdagin.

Trimble gav Blair freist til mánadagin ella týsdagin at leggja fram eitt endaligt uppskot um at útihýsa Sinn Fein. Verður tað ikki gjørt, fer norðurírska stjórnin í upployssn.

- Vit hava verið so lagaligir at geva forsætisráðharranum eina viku til at gera eftir boðunum, segði Trimble aftan á fundin við Blair.

Enn er ógreitt, hvat Tony Blair heldur um kreppuna, sum er íkomin, eftir at tað er komið fram, IRA hevur njósnast ímóti bretsku umsitingini og bretsku stjórnini, og at Sinn Fein helst hevur átt ein lut í njósningini. Blair hevði í gjár fund við írska forsætisráðharran Bertie Ahern, og í dag skal hann hitta leiðaran í Sinn Fein, Gerry Adams, sum hevur avsannað, at Sinn Fein visti um njósningina hjá IRA.

Sjálvur segði Tony Blair aftan á fundin við David Trimble, at hann ætlar sær framvegis at halda fast um ta sonevndu Langafríggjadagsavtaluna, tí hon er tann besta trygdin fyri, at friðartilgongdin í Norður-írlandi kann halda fram, segði hann.

Eygleiðarar í London vænta, at Tony Blair fer at nýta heimildina, sum hann hevur til at upploysa stjórnina í Belfast. Ger hann tað, er tað triðju ferð í trý ár, at tað verður gjørt.

# Colin Powell hevur svikið tey svørtu í USA

**- Amerikanski uttanríkisráðharrin sveik tað svarta fólkið í USA, tá hann fór upp í stjórnina hjá George W. Bush, sigur sangarin og tónleikarin Harry Belafonte, sum sjálvur er svartur**

USA
*Árni Joensen*

Í einari samrøðu við eina útvarpsstøð í Kalifornia samanbar Harry Belafonte uttanríkisráðharran Colin Powell við ein træl á einum av teimum gomlu bummulsgørðunum í amerikansku suðurstatunum. Trælahaldari og harri Powells er forsetin, George W. Bush, segði Harry Belafonte.

- Eitt gamalt orðatak sigur, at tað eru tvey sløg av trælum. Annað slagið eru teir, sum búgva úti á bummulsmarkini, meðan hitt slagið eru teir, sum halda til í harragarðinum. Tess meiri lýðin ein er, tess størri er møguleikin fyri at sleppa at búgva undir sama taki sum harrafólkið, segði Harry Belafonte og sipaði týðiliga til Colin Powell.

Tann kendi sangarin og tónleikarin vil eisini vera við, at tráðanin hjá Bush-stjórnini at leita eftir yvirgangsmonnum líkist meiri og meiri teirri antikommunistisku herferðini í McCarthy-tíðini í USA.

-Vit eru á veg inn í eina myrka tíð, segði Belafonte í útvarpssamrøðuni.

Forfedrarnir hjá Harry Belafonte komu eins og forfedrarnir hjá Colin Powell av oynni  Jamaica.



# Ein veteranur í handilslívinum í Havn fyllir sjeyti

**Í gjár kundi Eli Mellemgaard í Havn halda sín sjeytiára føðingardag. Eli er kendur handilsmaður, og flestu munnu kenna handilin "Hjá Eli" við Landavegin. Sum handilsmaður hevur hann verið langt frammanfyri sína tíð. Undir leiðslu av Eli, varð handilin hjá P.A. Restorff fyrsti sjálvtøkuhandil í Føroyum**

FØÐINGARDAGUR
*Rúna Sivertsen*



*Eli misti ikki mótið. Tá alt sá svartast út fyrst í nítiárunum, fór hann undir at byggja stóran handil við Landavegin. Hann sá tað neyðuga í at kunna keypa inn í stórum nøgdum, fyri at halda prísirnar á so lágum støði sum gjørligt. Myndin er tikin, tá handilin læt upp í 1993*

Eli er eitt arbeiðsgrev.

Hetta skoðsmál geva tey, ið kenna henda fryntliga og lítillátna mann, honum.

Jógvan Eli Mellemgaard er føddur og uppvaksin í Klaksvík, sonur Petru, fødd Hansen av Norðoyri og Hans Mellemgaard úr Svínoy.

Eli er giftur Sylviu Hammer úr Hvalba og eiga tey synirnar, Bjarta, Heðin og Róðin.

Longu sum 14 ára gamal, lærdi Eli handilslívið at kenna. Pápi hansara, sum eisini var fiskimaður, hevði handil í kjallaranum í heimi teirra á Heygum. Her fekk Eli sínar fyrstu royndir sum krambakallur.

Sum 16 ára gamal fór hann til Havnar í handilin hjá Gunnari Stockholm.

Eli sigur, at í fyrstuni longdist honum illa norðuraftur, men tað gekk ikki long tíð, so treivst hann væl í Havnini.

Eftir at hava verið í starvi hjá Gunnari Stockholm og Thomasi Dam í nøkur ár, byrjaði hann í 1957 sum krambakallur hjá Poul Andriasi Restorff. Hann var tá 24 ára gamal.

### Breyt burtur úr nýggjum

Handilin hjá P.A. Restorff var av tí gamla slagnum, har øll vøra varð seld um diskin. Fleiri vørur, so sum mjøl, sukur, kaffi og te máttu vigast.

Roykurin av kaffi og petrolium var eitt eyðkenni fyri hesar gomlu og hugnaligu krambúðir, sum nú eru vorðnar søga.

Ikki gekk long tíð, so gjørdist Eli leiðari av krambúðini hjá P.A. Restorff. Og við sínum góðu evnum og ágrýtni, stóð Eli fyri stórum broytingum í handlinum øll tey 25 árini, hann arbeiddi har.

Fyrsta stóra broytingin var, tá handilin í 1965 var umlagdur til sjálvtøkuhandil. Seinni varð handilin útbygdur við nýggjari sláturdeild. Tá starvaðust 12 fólk í handlinum hjá P.A. Restorff.

Í 1978 keypti Eli húsini hjá Jógvani Heinesen, keypmanni við Heygsvegin í vesturbýnum. Matvøruhandilin, sum fylgdi við í keypinum, leigaði Eli fyrstu árini út til P.A. Restorff.

### Satsaði í ringastu tíðum

Í 1982 byrjaði Eli sum sjálvstøðugur vinnurekandi. Skjótt vórðu útbygg-ingar gjørdar og handilin "Hjá Eli" bleiv ein vælvirkandi handil fyri viðskiftafólkið í vesturbýnum.

Tá fíggjarligu viðurskiftini fyrst í 90'unum gjørdust verri, fór Eli at hugsa um at byggja ein stóran handil. Ein størri handil fór at gera tað møguligt at keypa inn í størri nøgdum, og á tann hátt kundu prísirnir haldast á einum lægri støði.

Og í 1993, tá alt fyri mongum føroyingi sá daprast út, læt Eli sín nýggja handil við Landavegin upp.

Tað eydnaðist honum í hesi niðurgangstíð at gera ein handil, sum kundi bera seg, og sum samtundis gav kundanum meira fyri peningin.

Eftir hesi mongu ár sum handilsmaður, má Eli sigast at vera ein av veteranunum innan handilslívið í Havn.

Tað, sum sermerkir Eli, er reinføri. Alt, hann fæst við, er so gullreint, og tað sæst eisini aftur í handlinum.

Hann gongur høgt uppí at geva viðskiftafólkunum bestu tænastu og er altíð fúsur at fáa ta vøru til vega, sum kundin ynskir.

Eli er ein sonn býarmynd, sum altíð hevur nógv um at vera, og tað er ferð yvir manninum.

Nú Eli hevur rundað tey sjeyti, er hann enn líka virkin í handlinum.

Hóast hansara stóri áhugi er handil, hevur hann altíð givið sær stundir til orð Guds, og hansara trúgv myndar gerandisdag hansara

Við sínum arbeiðsemi og trúfesti, eydnaðist tað hesum lítilátna manni at føra sínar dreymar út í lívið.


*Gamli handilin hjá P.A. Restorff, har Eli byrjaði sum krambakallur, 24 ára gamal. Henda myndin er frá tí tíðini, tá tú kundi standa og slappa av, meðan ein vøra fyri og onnur eftir varð latin tær yvir diskin. Kemur tú framvið kaffimylluni í største matvøruhandlinum í Føroyum í dag, Mikalgarði, man roykurin av nýmælnum kaffi, skjótt flyta teg aftur í tíðina til petroliumsroykin og ljóðið av knirkandi mjølskuffum*


*Nýggjar tíðir seta nýggj krøv; tað var Eli frá ungum av tilvitaður um. Sum leiðari av krambúðini hjá P:A: Restorff, sygdi hann fyri, at handlin gjørdist fyrsti sjálvtøkuhandil í Føroyum. Frá vinstru: Solveig Olsen, Ásla Paturson, Ellen Petersen, Marjun Leo, Eli Mellemgaard, Petur Jensen og systrarnar Maria og Osla Gullbro*